# nlandi






kava og sól.

Joan hevur 8 tíma langan arbeiðsdag hjá Sæunn og Bjarta og tí hevur hon sett sær fyri at koma at kenna grønlendingar og teirra arbeiðslív. Hon setti eina lýsing í lokala blaðið, og seinastu tveir mánaðirnir hevur hon nøkur kvøld eftir loknan arbeiðsdag hjá Sæunn og Bjarta fingið sær eitt annað arbeiði á einum eldrasambýli í Nuussuaq. Samstundis forvinnur hon nøkur eyka oyru, nú hon er heimanífrá.

Staðið eitur Ippiarsuk og hevur 21 búfólk. Joan heldur, at tað er super arbeiðspláss við góðum fólki og uppgávum! Joan hevur eisini í praktikk á Verkstaðnum Vón á Argjum, so arbeiðið á hesum heiminum er ikki ókent fyri hana. Joan sigur, at hennara framtíðarætlan er, at hon fer at lesa okkurt innan pedagogikk, til dømis sosialpedagog, har kann hon arbeiða við menningartarnaðum í Føroyum.

## Skeiv mynd av Grønlandi

Joan sigur, at Nuuk er ein býur á støðd við Havnina. Har búgva umleið 17.000 fólk og er býurin lættur at ferðast í. Hon leggur afturat, at Nuuk er øgiliga isoleraður, líka sum allar tær smáu bygdirnar í Grønlandi. Í Føroyum kanst tú koyra úr Gásadali til Viðareiðis, men í Nukk er eingin vegur til ella frá Nuuk. Skal man nakrastaðni, so er tað við flúgvara ella báti, og so má man jú seta sær nakrar dagar av í kalendaranum til tað.

Joan heldur at tað er millum annað tað sum er so sjarmerandi við Grønlandi. Uppfatanin av fólkunum í Grønlandi hevur hon broytt. Fólkini eru av teimum allar fittastu her í býnum. Áðrenn eg fór avstað helt eg at Grønland var bara alkohol og elendigheit, men hetta vísti seg at verða ein skeiv mynd eg hevði fingið, sigur Joan og leggur afturat, at her er fantastiskt at verða í Nuuk.

- Nei, sigur Joan eg skal ikki gera tað betur enn tað er í Grønlandi, tí støðan er ring millum ávísar bólkar, men flestu fólkini eru stás menniskju, ið vilja tað besta fyr landið og fólkið hjá sær.

Tað vísti eisini valið, sum júst hevur verið her, sigur Joan. Siumut-flokkurin við Hans Enoksen hevur sitið við ræðið í 12 ár nú, og nú varð IA-flokkurin valdur inn við heili 44%. Nú skal vend koma í í Grønlandi! og tað er spennandi sigur Joan.

## Á skíð og kavaskutara ...

Spurd um tað eru nógvir útlendingar í Grønlandi, sigur Joan avgjørt ja, og hon heldur, at tað er so stuttligt í Grønlandi, at so nógvir nationalitetir møtast. Hon sigur frá, at eitt kvøldið hon var úti saman við eini nýggjari russiskari vinkonu, sótu tær saman um eitt borð og prátaðu.

- Har var eg, føroyingur, ein russari, ein dani, grønlendingur og ein týskari, øll møttust har av tilvild fyri at fáa eina góða uppliving, sigur hon við einum smíli.

Harumframt hevur hon tosað við fólk úr Afrika, Filipsoyggjunum, Íslandi, Canada og onnur. Ótrúligiga stutligt.

Nú eru næstan fimm mánaðir gingnir síðani Joan fór til nyggja landið, nógv ísfjøll eru bráðnað og hon hevur upplivað nógv á ferðini.

Millum annað hevur hon lært at staði á skíð, koyrt við kavaskutara uppi í fjøllunum, sæð eina ísbjørn, etið grønlendskan mat, verið bátatúrar í fjørðinum, sæð tað vakrasta norlýsið og sólsetur, vitjað heimsins største postkassa, verið til føroyingakvøld saman við eini 50 føroyingum í Nuuk, fortelur hon stolt í telefonini úr Nuuk.

## Heimligt

Joan sigur at hon kundi nevnt nógv aftrat hasum! Ja, eitt hendingarríkt hálvt ár, og tað er ikki liðugt enn! Hon heldur at tað var eitt sindur undarligt at halda sín 21 ára føðingardag har yviri, uttan alla familjuna. Hóast langt vekk, so hugnaðu tey sær tann dagin við kaku, føroyskum fløggum og gávu.

Joan gleðir seg at koma heim.

- Nú er ikki leingi til retur-bilettin skal brúkast. Tað verður undarligt at fara frá staðnum sum hevur verið dagligdagurin hjá mær í eitt hálvt ár, sigur hon

Hon sigur, at tað følist so heimligt her í Nukk eftirhondini. Nýggir vinir, kenningar og enntá fleiri av teimum føroyingar, sum hon helst ikki missir sambandið við.

- Ordiliga stuttligt! Men tað verður ótrúliga deiligt at síggja øll aftur har heima, men tað verður uttan iva við sorgblídni, at eg hyggi niður á Nuuk úr Air Greenland flogfarinum á veg uppfrá flogvøllinum í Nuuk a veg til Føroyar aftur, sigur Joan, ið eisini upplýsir, at hon hevur skrivað blog inni á *www.getjealous.com/joanwaaghognesen* so gott sum hvørja viku síðani hon kom til Grønlands. Míni "foreldur" í Grønlandi, Sæunn og Bjartur hava veruliga givið mær eitt ordans upplivilsi og tað gloymi eg teimum ongantíð aftur, sigur Joan at enda, men vil fegin leggja afturat, at hetta er ikki seinastu fer hon er í Grønlandi.